## Mentamálaráðið
**Fólkaskúladeildin**

# Endurlýsing
# Fyrstilærari í Kaldbaks skúla

Starvið sum fyrstilærari í Kaldbaks Skúla verður lýst leyst til setanar frá **1. august 2003.**

Skúlaárið 2003/2004 verða 33 næmingar í 7 árgangum í skúlanum. 2 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum og hevur hugsjónir um skúlamenning
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal fyrstilærarin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- vera førur fyri at útinna starvsfólkaleiðslu
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum í Streymoyar skúladømi III við fyribils tænastu í Kaldbaks skúla, og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 27.3, 29.1, 31.1 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum liggur á heimasíðuni *www.mmr.fo*, skal vera Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi hósdagin 22. mai 2003.**

Umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

**7. mai 2003**
**Mentamálaráðið**
**Hoyvíksvegur 72 - Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 355050 - Fax 355055 -e-postur: MMR@MMR.fo**

*Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

# Reingerðarfólk

Fyri starvsfólk, ið fer frá vegna aldur, verður lýst eftir fólki at gera reint á Løgmansskrivstovuni frá 1. august 2003 ella skjótast gjørligt.

Talan er í fyrsta lagi um alla reingerð í Sjóð- og Vektarbúðini.

Tann, ið settur verður, skal vera røkin, álítandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Arbeiðstíðin er sett til 20 tímar um vikuna og er vanliga eftir kl. 16 yrkadagar. Broytingar kunnu tó gerast eftir nærri avtalu millum partarnar.

Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Petur Simonsen, deildarleiðara, tlf. 351010 at hoyra nærri um starvið.

Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast

**Løgmansskrivstovuni**
Postsmogu 64
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. juni 2003.

*Løgmansskrivstovna fyrireikar mál løgmans og ráðgevur løgmanni í sínum arbeiði at sita fyri landsstýrinum. Løgmansskrivstovan er skipað í stjórnardeild, uttanríkisdeild og ritaraeind og hevur í høvuðsheitum samskipandi, eftirlits og tvørvegis uppgávur, eitt nú landsstýrisfundir, uttanríkismál, umboðan og fyrisiting.*

# Kunngerð
## um uttangarðsútskiftingarfund í Sumba

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund hósdagin 12. juni kl. 14.00 í húsinum hjá millumbylgjusendaranum í Akrabergi.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum Blæing, Heimaripartur.

Nevndarlimir eru Louis Houmann, Oyndarfjørður, og Súsanna í Búðini, Velbastaður.

N.v.
**Øssur Á. Midjord**
**útsk. form.**

# Hús til sølu

Húsini á Bumshamarsvegi 15 í Klaksvík til sølu fyri hægstbjóðandi.

**Áhugað ringið 456225**

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Danstein** Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

# Ph.D.-ritgerð góðkend til verju á Fróðskaparsetri Føroya

Fríggjadagin 6. juni 2003 fer Jóannes Djurhuus, cand. Scient. at verja Ph.D.-ritgerðina "Analytical investigations of in-situ stresses and hydraulic induced borehole fractures" við Fróðskaparsetur Føroya.

Í dómsnevndini hava sitið John Sebastian Bell, Ph.D., chief scientist hjá Sigma H. Consultants í Kanada, Arild Saasen, Ph.D., serfrøðingur frá Statoil í Noregi og Per Amund Amundsen, professari, Dr.Philos frá Høgskolen í Stavanger, Noreg

Sjálv verjan, sum er almenn, fer fram í høllini á Føroya Læraraskúla. Byrjað verður klokkan 13.00.

Ritgerðin "Analytical investigations of in-situ stresses and hydraulic induced borehole fractures" liggur alment frammi á Náttúruvísinda-deildini á Fróðskaparsetrinum og á Landsbóka-savninum frá fríggjadegnum 16. mai 2003.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
J.C. Svabos gøtu 14
100 Tórshavn



# Ársroknskapur 2002

## Rakstrarroknskapur

| 1000 kr. | 2002 | 2001 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 20.257 | 22.370 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 7.509 | 9.028 |
| Netto rentuinntøkur | 12.748 | 13.342 |
| Vinningur av partabrøvum | 69 | 83 |
| Kostnaður og provisjónsinntøkur | 2.092 | 1.777 |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 14.909 | 15.202 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | 1.698 | 296 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 138 | 230 |
| Úrslit av fíggjarpostum | 16.745 | 15.728 |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 10.884 | 10.213 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 607 | 1.004 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 119 | 116 |
| Tap og burturleggingar | 1.776 | 2.401 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 3.359 | 1.994 |
| Aðrar óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| Aðrar óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| Úrslit av vanligum rakstri undan skatti | 3.359 | 1.994 |
| Skattur | 705 | 662 |
| Ársúrslit | 2.654 | 1.332 |
| Býti av rakstrarúrsliti | | |
| Ársúrslit | 2.654 | 1.332 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 33.178 | 31.846 |
| Broyting av roknskaparhátti viðvíkjandi útsettum skatti | 81 | 0 |
| Flutt frá øðrum grunnum | 119 | 116 |
| Til nýtslu | 36.032 | 33.294 |
| Flutt til grunnar | 119 | 116 |
| Framflutt úrslit | 35.913 | 33.178 |
| Tilsamans | 36.032 | 33.294 |

## Fíggjarstøða 31. desember

| 1000 kr. | 2002 | 2001 |
|---|---|---|
| Ogn | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 6.362 | 6.979 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 25.065 | 62.577 |
| Útlán | 240.245 | 224.316 |
| Lánsbrøv | 96.932 | 64.039 |
| Partabrøv | 500 | 516 |
| Ítøkiligar ognir | 3.752 | 3.868 |
| Aðrar ognir | 170 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | 621 | 363 |
| Ognir tilsamans | 373.647 | 362.658 |
| Skuld | | |
| Skuld til fíggjarstovnar og tjóðbankar | 7.189 | 4.896 |
| Innlán | 325.804 | 320.412 |
| Onnur skuld | 1.834 | 1.305 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 9 |
| Avsetingar til skyldur | 800 | 800 |
| Eginogn | | |
| Ábyrgdarapeningur | 907 | 858 |
| Grunnar | 1.200 | 1.200 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 33.178 | 31.846 |
| Broyting av roknskaparhátti viðvíkjandi útsettum skatti | 81 | 0 |
| Flutt frá ársúrsliti | 2.654 | 1.332 |
| Eginogn tilsamans | 38.020 | 35.236 |
| Skuld tilsamans | 373.647 | 362.658 |
| Tøl, sum ikki eru við í fíggjarstøðu | | |
| Ábyrgdir o.a. | 2.979 | 3.794 |

**SUÐUROYAR SPARIKASSI**




# Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

**Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.06.03**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Sosialurin 341800

# Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!